# MATINUM

*Vit hava valt nakrar tilvildarligar vørur úr føroyskum handlum og hugt eftir, hvat tær innihalda.*




FAKTA **INNIHALDSYVIRLIT**

## Soleiðis lesur tú innihaldsyvirlit

**Um vit taka vanilju *Ísblómuna* frá Fóm sum dømi, inniheldur hon mest sukur, tí tað stendur fremst í »Tilfar-listanum«, næstmest mjólkarturrevni og triðmest plantufiti. Hesin háttur at seta innihaldsyvirlit upp er altjóða viðurkendur.**




**Fun light saft (hindber/orange)**
Inniheldur 15 ymisk evni. Mest vatn, síðani 4,6% apelsinsaft og 0,1% hindbersaft. Reklamerað verður við, at saftin nú ikki inniheldur nøkur kunstig litevni (Fun saftin hevur fingið sera nógva ábreiðslur fyri tey nógvu kemisku evnini) - litirnir eita nú betacaroten og anthocyaniner.

**Aceto balsamico di modena**
Balsamicoedikkur, ið verður nýttur sum salatdressingur er ikki tann ektaði balsamicoedikkur, ið er dýrur og verður leingi lagraður á eikfati. Hesin dressingurin er edikkur og drúvumos, ið er litað brúnt.

**Oliven frá Coop**
230 gram, men einast 106 gram eru oliven.

**Sunfresh djús**
Inniheldur mest vatn og sukur. Á triðja plássi kemur 5% av fruktdjus. Inniheldur níggju ymisk E-nummur.

**Glyngøre rogn guf**
Inniheldur 14 ymisk evni. Av innihaldinum er 44% rogn, restin er vatn, olja, sinoppur og ymisk E-nummar

**Bolognese frá Toro**
Inniheldur E621

**Wienarpylsur frá Coop**
Innihalda 56% grísakjøt, 20% vatn og 14% neytakjøt.

**Risifrutti**
Inniheldur mest mjølk og vatn. 8,5% rís og 8% sukur.

**Guacamole dip frá Santa Maria**
Guacamole er upprunaliga ein sós gjørd av avokado. Henda sósin inniheldur 1,5% avokado og 23 onnur evni. Inniheldur E621.

**Brún sós frá Toro**
Inniheldur E621

**Taco spice mix frá Santa Maria**
Inniheldur mest drúvusukur, síðan 17,5% salt.

**Livurpostei frá Krás**
Reklamerar við, at tað er framleitt í Føroyum, men svínalivurin og fleskið er úr Danmark. Inniheldur E621